GREINARØÐ

# VÓNIN VAR STERKASTA SVØRÐIÐ

**MICHAEL GORBATJOV** NOKTAÐI AT BRÚKA VALD, HARÐSKAP ELLA HERMEGI FYRI AT HALDA UM EITT VALD, SUM VAR **DEYÐADØMT**. **NÆSTRAKÆRLEIKI** HANSARA VANN Á ØLLUM – EISINI Á BÚSKAPARLIGU ÆTLANUNUM UM AT BROYTA **KOMMUNISMUNA** TIL SOSIALISMU



KALDA KRÍGGIÐ

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

»Vit kunnu ikki halda fram við at liva soleiðis!«

Orðini segði Michael Gorbatjov við konu sína, Raisu, kvøldið fyri hann skuldi takast í eið sum nýggjur aðalskrivari fyri sovjetsamveldið.

Kanska bara níggju orð. Men fimm orð, sum vóru kjarnin í øllum tí, sum Gorbatjov kom at standa fyri.

Gorbatjov var bara 54 ár, tá hann kom til valdið, og við hesum varð hann yngsti sovjet-leiðarin síðani Stalin. Og hann var tann fyrsti síðani Lenin, ið hevði útbúgving frá hægri lærustovni.

Kanska var tað hetta, sum gjørdi, at Sovjetsamveldið brádliga hevði ein leiðara, sum var bæði víðskygdur og tolerantur. Og í øllum førum var tað eitt skifti av teimum heilt stóru, at heimsins størsta tjóð nú hevði ein leiðara, sum púrasta opið viðgekk feilir og marxistisu/leninistisku ideologi'ini.

Sjarmerandi og smílandi var hann fullkomuliga ymiskur frá undangongumonnum sínum, og skjótt gekk eisini sjón fyri søgn, at tað var meira enn bara tóm orð í tí, sum hann førdi fram. Orð sum Glasnost (opinleiki) og Perostrojka (umskipan) komu breddan – ikki bara í Sovjetsamveldinum – og eitt nú skelkaði hann ovastu sovjettina, tá hann í 1987 errin almannakunngjørdi eitt brævfrá einum fjeppara, sum ynskti honum tillukku við at hava koppa nøkrum gomlum og senilum einaræðisharrum.

## Nyttuleys kjarnorkuvápn

Saman við Reagan kom Gorbatjov at standa sum ímyndin av endanum av kalda krígnum. Men hóast toppfundirnir teirra millum standa sum varðar í altjóða søguni, so vóru ítøkiligu úrslitini av fyrsta fundinum í Geneve ikki so stór. Meira vóru tað árinini av, at eystur og vestur brádliga høvdu tveir leiðarar, sum kundu, dugdu og vildu tosa saman, ið av álvara skumpaðu undir eina hugburðsbroyting kring allan heim.

Toppfundurin í Geneve í 1986 endaði mest sum púrasta uttan úrslit, men kortini sannførdi fundurin Gorbatjov um, at kalda kríggið kundi endast. Snøgt sagt, tí hann var púrasta sannførdur um, at einki av stórveldunum nakran tíð fór at gera nýtslu av kjarnorkuvápnum sínum.

Ítøkiliga úrslitið kom í oktober mánaði sama ár, tá teir báðir leiðararnir hittust í Reykjavík. Høvuðsstaðnum, sum við síni plasering í Atlantshavinum mest sum symboliseraði ein fund, har báðir partar komu móti miðjuni.

Uttan at blunka góðtók Gorbatjov uppskotið hjá Reagan um, at allar millumdistansu rakettir í Europa skuldu takast niður. Hartil skeyt Gorbatjov upp, at strategisku vápnagoymslurnar hjá stórveldunum skuldu skerjast við 50%. Reagan vildi ikki standa aftanfyri, og tí gjørdist talan mest sum um kapprenning, har báðir leiðararnir vildu vísa, hvør teirra í størstan mun kundi enda kalda kríggið.

Einasti bágin tóktist vera kravið frá Gorbatjov um, at USA skuldi steðga sínum ætlanum um SDI-raketverjuskjøldurin. Og hóast Reagan ikki beinleiðis vildi góðtaka hetta, so góðtók hann kortini, at SDI ikki hevði nakað endamál, um kjarnorkuhóttanin kortini kundi takast burtur.

Teir báðir megnaðu kanska ikki at taka øll kjarnorkuvápn av klótuni. Men eftir at heimurin í nærum trý áratíggju hevði verið hildin á pínubeinkinum, nýttu Reagan og Gorbatjov bert tvey ár til at broyta heimsfatanina av atomaru hóttanini.

## Skrottaði kommunismuna

Eitt var, at Gorbatjov var høvuðsmaðurin í endanum av kjarnorkuhóttanini. Annað var, at hann eisini var maður fyri at lata jarntjaldið falla.

Hann ásannaði uttan at blunka, at kommunisman hevði avleitt ein stat, har livistøðið var lægri og har samfelagsmenningin á øllum økjum gekk nógv seinni, enn hon gjørdi í vesturheiminum. Hann hevði við stórum áhuga fundir við amerikanska uttanríkisráðharran, George Shultz, ið var búskaparfrøðingur, har Shultz kundi oysa út av síni vitan um menningarmøguleikarnar, sum ein marknaðarbúskapur hevði við sær.

Fleiri søguskrivarar hava ført fram, at Gorbatjov mest sum góðtrúgvin góðtók alt, sum Shultz førdi fram, men neyvan er hetta heilt satt. Men hann nýtti Shultz til fyrilestrar í Moskva, og til stuttleikar helt hann fyri, at amerikumaðurin átti at yvirtikið sovjettisku skrivstovuna fyri tilrættisleggjan av samfelagsbúskapinum.

Í bók síni, Perostrokja (1987), nemur Gorbatjov fleiri ferðir við vandan, sum tað avleiðir, tá framgongdin í samfelagnum støðugt skal setast eftir aftasta vogninum heldur enn lokomotivinum. Men hann minti samstundis á, at hann ikki uttan víðari vildi geva seg til karráðu kapitalismuna. Og hann minti í sama viðfangi á, at Roosevelt hevði frelst kapitalismuna við at læna hugskot frá sosialismuni í síni New Deal. Nakað sum Gorbatjov sjálvur ynskti at gera við øvutum forteknum, soleiðis at planbúskapurin kundi læna frá marknaðarbúskapinum fyri at skapa ein sunnan búskap.



*Høvundurin framman fyri húsini við Høfd í Reykjavík. Her tóku Reagan og Gorbatjov fyrstu veruligu stórlopini í tí, sum gjørdist byrjanin til endan á kalda krígnum*

## Opinleiki og kærleiki

Hóast Sovjetsamveldið nú hevði ein beinleiðis humaniteran leiðara, so helt sonevnda Reagan-doktrini fram frá amerikanskari síðu. Í loyndum vórðu antikommunistiskar kreftir í Moskva, Havanna og aðrastaðni við stuðlaðar, og sjálvur royndi Reagan við sínum almennu røðum at skumpa undir gongdina.

Ein tí mest kendu av slagnum helt hann í Berlin í 1987, tá hann segði »Mr. Gorbatjov – Tear down this wall«, men russiska reaktiónin var merkisvert

**Keldur:**
Den kolde krig, John Lewis Gaddis, 2005 Hitler and Stalin, Alan Bullock, 1992
Erindringer fra krig og genopbygning, Leonid Brezjnev, 1978 Perostrojka, Michael Gorbatjov, 1987
Stalin – Den røde zar og hans hof, Simon Sebag Montefiore, 2004 wikipedia